

# VIÐ HVØRT MÁST T

HANN ER LANDSKENDUR SUM **FÓTBÓLTSDÓMARI**. Í HAVN ER HANN ÍMYNDIN AV ØLKLUBBANUM **MIMIR**. MEN HVAT HELDUR **NEMUS NAPOLEON DJURHUUS** UM FULL FÓLK, ÓMØGULIGAR FÓTBÓLTSSPÆLARAR, UM AT VERÐA SLIGIN OG UM AT SKEINKJA ØL OG BRENNIVÍN FYRI FÓLKI. VIT FÓRU Á VITJAN, OG **NEMUS** SETTI SEG Í SÍN STÓL OG SVARAÐI OKKARA SPURNINGUM.

**SAMRØÐA**
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

– Hetta er mín stólur. Her skal eingin annar sita.

Hann setur seg flennandi í lenistólin í horninum í stovuni. Frammanfyri sær hevur hann ein skammil við einari bláari pútu, og á borðinum undir liðini á sær hevur hann alla neyðsynjarútgerð – sigarettir, øskubikar, fjarstýring, brillueskju og eina Sisu.

Vit eru heima hjá Nemus Napoleon Djurhuus í Dr. Jacobsens gøtu mitt í Havnini.

Nemus er kendur kring landið sum fótbóltsdómari í meira enn 30 ár. Hann var fyrsti føroyingurin, sum dømdi ein altjóða a-landsdyst í fótbólti, og í Havn kenna tey hann sum barrvørðin í ølklubbanum Mimir, har hann hevur arbeitt í meira enn 20 ár.

Nemus er Nemus, og hann torir at standa við sínar meiningar.

– Eg haldi, at erligheit røkkur longst, hóast mann kann fáa problemir av tí. Tá tú vanliga ert erligur og sigur sum er, so kanst tú onkuntíð sleppa við einari hvítari lygn og siga, at okkurt er pent, sum tú heldur er ljótt, sigur Nemus – og so er forherðaða smílið beinanvegin har.

Honum dámar einki politikarar, sum royna at sleppa sum lættast fram við øllum trupulleikum.

– Eg havi lítla virðing fyri teimum, sum altíð royna at sigla ímillum skerini. Við hvørt mást tú renna á land, sigur hann.

## Dómaratroyggja sum lárkort

Nemus byrjaði at døma fótbóltsdystir tíðliga í sjeytiárunum, og longu í 1974 dømdi hann sín fyrsta landsdyst. Hann átti eingi dómaraklæði, men varð settur at døma Føroyar-Hetland í Gundadali.

– Eg mátti læna dómarabúna frá Dánjal Jákup Thomsen, sum var ein stórur hvalbingur, og dómaratroyggjuna kundi eg brúka sum lárkort, sigur Nemus.

Nemus var fyrsti føroyski fótbóltsdómarin, sum dømdi ein altjóða skrásettan a-landsdyst. Tað var í 1993, tá ið Luksemborg og Ísland spældu. Samanlagt dømdi hann einar 30 altjóða dystir, áðrenn hann gavst.

> Eg havi lítla virðing fyri teimum, sum altíð royna at sigla ímillum skerini. Við hvørt mást tú renna á land

– Einaferð tá ið eg dømdi ein UEFA-dyst hjá Royal Antwerpen, var eg interviewaður av einum sjónvarpsliði aftaná, og tá spurdu teir meg, hvat eg gjørdi. Eg spurdi hinar, um eg skuldi siga, at eg rak eina smugkro ella var timburmaður. Eg segði, at eg var timburmaður, og teir flentu, so teir næstan ikki fingu luft.

Gud viti, hvussu tað hevði verið, um hann fortaldi teimum um Mimir.

## Stongdi seg inni

Her heima dømdi Nemus óteljandi dystir í bestu deildini, og hann var í nógv ár roknaður sum besti dómarin í landinum. Og hóast ein og hvør dómari kann enda í rokaligum støðum, so hevur Nemus fá keðilig minni frá fótbóltdystum.

– So at siga altíð kundi mann taka í hondina á hvørjum øðrum eftir dystin. Eg havi bara einaferð upplivað ein dyst, har tað var so nógv rok, at vit máttu steingja okkum inni í dómararúminum eftir dystin fyri at fáa frið. Og bara einaferð upplivdi eg, at onkur ringdi til mín og segði, at um eg vísti meg aftur á einum ávísum plássi, so skuldi eg fáa tað, sigur Nemus.

– Tað var spennandi at døma, og eg gjørdi tað ikki fyri pengarnar. Tá vit byrjaðu at døma, fingu vit 150 krónur fyri hvønn dyst, og tá ið eg gavst, vóru upphæddin komin upp á 300 krónur. Hevði eg ikki hildið tað verið stuttligt, so hevði eg ikki hildið áfram í so langa tíð.

Nemus gavst at døma í 1995, men síðani hevur hann verið virkin sum eygleiðari av dómarum, og synir hansara, Ríkin og Ransin, eru blivnir dómarar.

– Dømingin liggur eftir øllum at døma í blóðinum, og nú hevði eg viljað, at vit tríggir dømdu ein dyst saman, sigur Nemus.

## Tolin og lurtar

Í Havn er Nemus ikki minst kendur sum barrvørðurog leiðari í ølklubbanum Mimir, og har hevur hann brúkt nógva tíð seinastu 23 árini. Nemus gjørdist nevndarlimur í Mimir í 1976, og 10 ár seinni fór hann at starvast í klubbanum. Og har er hann framvegis at finna sum dagligur leiðari.

– Tað hevur verið stuttligt og gevandi at arbeitt í Mimir. Eg havi brúkt mínar dómararoyndir í Mimir, og eg havi brúkt mínar royndir frá Mimir í dómarayrkinum. Tað, sum kann brúkast í báðum støðum, er, at tú skalt verða tolin og lurta, tá ið fólk eru ill og vilja skelda teg. Tú kanst loysa nógvar støður við bara at lurta. Eg havi sjálvandi øst meg onkuntíð, men eg havi lært, at fólk kunnu sissast við at lurta eftir teimum, sigur Nemus.

– Øll hesi árini í Mimir eri eg bara sligin tvær ferðir, so tað haldi eg er væl sloppið. Fyri tað mesta eru gestirnir í Mimir fitt fólk, sum duga at drekka, men tað eru av og á fólk, sum ikki duga sær hógv.

## Kona mín skilur meg ikki

Nemus Napoleon hevur í nógv ár staðið aftan fyri barrdiskin í Mimir og skonkt sterkan løg til fólk, og hann veit, hvussu fólk bera seg at, tá ið tey fáa rúsdrekka niðurum.

– Tey flestu blíva í góðum lag, onkur blívur óreinur, og so eru tað onkur, sum vilja berjast – fjúsið blívur stutt, og tað virkar, sum allar undirlutakenslurnar skulu út í einum, sigur hann.

– Men ein vandi við at selja rúsdrekka til fólk er, at tey blíva full.

Og sum eitthvørt annað stað í náttarlívinum, hevur Mimir sín karantenulista, har fólk, ið hava skapað sær ov nógv, verða sett á.

– Snórurin er langur, áðrenn tú verður skrivaður á karantenulistan, men um tú ikki aktar boðini frá barrvørðinum, so er tað neyðugt við hvørt at tveita fólk út og geva teimum karantenu í eina tíð, sigur Nemus.